# Telduskeið í heyst!



*16. og 17. november*

## Kom í gongd við at brúka teldu

Tú hevur atgongd til teldu á arbeiðsplássinum og kanska eisini heima. Kanska hevur tú enntá internetsamband, men tú kemur bara ikki í holt við at brúka tað.

Ikki tí, tú hevur kanska fleiri ferðir fingið hjálp frá børnunum ella øðrum, men so skjótt tey fara í gongd, fert tú í baklás. Tað gongur alt for skjótt fyri seg. Tú sigur bara ja, ja... Og tá tey eru farin út um dyrnar, so følir tú teg næstan enn meiri mótleysan enn áðrenn tit fóru í gongd.

Kundi tú hugsa tær at lært at brúka telduna - í slow motion, soleiðis at tú fært tað við og veruliga kann nýta telduna aftaná?

Kom á 2-daga skeið saman við tínum líkum og fá teldudreymin uppfyltan ;-).

Kr. 3.500 + mvg. (4.375 kr. v/mvg.) v/kaffi og frokost

*7. & 8. september*

## Excel I - fyrstu fetini

Situr tú enn við roknimaskinuni og hyggur eitt sindur øvundsjúk/ur eftir teimum, sum bara tasta alt inn á Excel og vupti, so er úrslitið klárt?

Ella brúkar tú kanska Excel í minni mun, men kundi hugsa tær at lært forritið heilt frá grundini?

Tað er nú, tú hevur møguleikan at læra og fáa stóra gleði av Excel.

Kom á 2-daga skeið saman við tínum líkum og fá Excel-dreymin uppfyltan;-).

Teknað teg skjótast, tí plássið er sera avmarkað!

Kr. 4.500 + mvg. (5.625 kr. v/mvg.) v/kaffi og frokost.

*27. & 28. oktober*

## Excel & PowerPoint fyri sølufólk

Kom og fá skil uppá sølutølini og framløguna av teimum. Hetta er *skeiðið* fyri tey, sum ynskja sær

- at fáa yvirblik yvir sølu til ávísan kunda
- at rokna avsláttarstig út
- at gera snild rokniørk til skiftisavlop og -avkast
- at flyta dáta frá sølu- og umsitingarskipanum til Excel fyri síðani at rokna, seta saman, greina og sjónliggera dáta m.a. við PowerPoint
- at keta PowerPoint framløgu til Excel, soleiðis at framløgan altíð er dagførd.

Kr. 6.000 + mvg. (7.500 kr. v/mvg.) v/kaffi og frokost

## Skeið á tykkara arbeiðsplássi!

Eru tit fleiri á tínum arbeiðsplássi, sum kundu hugsa sær á sama skeið. Td. Excel ella okkurt annað spennandi? So ber væl til at fáa undirvísaran heim til tykkara.

Heima hjá tykkum ber væl til at koma inn á júst tey øki, ið tit hava trupulleikar við í tykkara dagligdegi. Tit kunnu sostatt tosa og læra um júst tykkara øki og soleiðis eisini fáa loyst konkretar og veruligar trupulleikar á sjálvum skeiðnum.

Førleikamenning ger at vit fáa betri arbeiðspláss, glaðari og meiri motiveraði starvsfólk og harvið eitt betur og stuttligari samfelag at liva í.

Tekna teg og les meiri um skeiðini á heimasíðu okkara www.synergi.fo. Ella slá uppá tráðin, tel. 32BELL - og tað er: tel. 322 355. Vælkomin til tiltøk hjá Synergi!

Synergi

## HBF venjingartíðir fyri 2009/2010

| Tíð | Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag | Fríggjadag |
|---|---|---|---|---|---|
| 16.00-16.30 | U9 Ó | U13 Ó | U11 | U13 Ó | U9 Ó |
| 16.30-17.00 | U9 Ó | U13 Ó | U11 | U13 Ó | U9 Ó |
| 17.00-17.30 | U11 Ó | U13 | U11 | U 13 | U11 Ó |
| 17.30-18.00 | U11 Ó | U13 | Motionistar | U 13 | U11 Ó |
| 18.00-18.30 | U11 Ó | U13 | | U13 | U15-17 Ó |
| 18.30-19.00 | U11 | U15-17 | | U15-17 | U15-17 Ó |
| 19.00-19.30 | U11 | U15-17 | | U15-17 | U15-17 Ó |
| 19.30-20.00 | U11 | U15-17 | 2. lið | U15-17 | Úrvalsvenjing |
| 20.00-20.30 | Motionistar | 1. lið | 2. lið | 1. lið | Úrvalsvenjing |
| 20.30-21.00 | | 1. lið | 2. lið | 1. lið | Úrvalsvenjing |
| 21.00-21.30 | | 1. lið | Motionistar | 1. lið | |
| 21.30-22.00 | | 1. lið | | 1. lið | |
| 22.00-22.30 | | | | | |
| 22.30-23.00 | | | | | |

| Tíð | Sunnudag |
|---|---|
| 9.00-11.00 | **Familjubadminton.** |
| 18.00-23.00 | Motionistar |

### Gevið gætur!

Ó = Óroynd. Har onki annað er viðmerkt, merkir roynd
ir leikarar. U15-17 fríggjadag er ein blandaður bólkur við bæði royndum og óroyndum leikararum .
Familjubadminton er ókeypis fyri alla familjuna, um eitt barn er limur. Venjarayvirlitið er at síggja á www.hbf.fo

### Kostnaður

| | |
|---|---|
| U9-U15 (óroynd) | 400 kr |
| U9-U15 (roynd) | 500 kr |
| 1-lið | 700 kr |
| 2-lið | 30,- hvørja ferð |
| Motiónistar | 300 kr (+ vallarleigu, sí www.hbf.fo) |

### Tilmelding

Tilmelding fer fram leygardagin 29. august millum kl 13.00 - 15.00 í Badmintonhøllini í Havn. Limagjald skal gjaldast við tilmelding. Havið reiðan pening við.